Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Elinborg og Sólarn Solmunde gullbrúdleyp



Fríggjadagin 9. januar hava hjúnini, Elinborg og Sólarn Solmunde í Syðrugøtu, gullbrúdleyp.

Sólarn er føddur 20. juni 1926 og er sonur Hans Marius og Jóhonnu Solmunde úr Søldarfirði. Hann var bert seks ára gamal, tá hann misti mammu sína av tuberklasjúkuni, og gjørdist hon bert 29 ára gomul.

Sum 20 ára gamal fór hann til skips, til Íslands við íslendskum togara og so seinni eitt nú til Grønlands við Jóannesi Paturssyni.

Seinnu helvt av sekstiárunum og fram til seinast í sjeytiárunum, arbeiddi hann á fiskamjølverksmiðjuni í Syðrugøtu til hetta virki helt uppat.

Síðani starvaðist hann hjá SEV, til hann fór frá vegna aldur.

Sólarn røktaði 3 hagapartar í Søldarfirði í einum tíðarskeiði uppá 30 ár.

Hagin Á Fløtum sum Rólant Olsen átti, røktaði hann í 30 ár. Hagin Í Skriðunum sum ytrimenn áttu, røktaði hann í eini 20 ár og hagin Undir Kletti sum Sámal Jákup Lamhauge átti, røktaði hann í uml. 10 ár.

Hann var dyggur í ráðum og skilamaður tá tað snúði seg um seyð og seyðahald, kendi sum fáur hvønn einstakan seyð og fleiri seyðaættarlið hjá bóndum og traðarmonnum.

Hann giftist við Elinborg í Bartalsstovu úr Syðrugøtu, og búsettust tey har.

Elinborg er dóttir Malenu og Hans í Bartalsstovu, hon er fødd 19. juni 1929 og fór hon sum ung niður til Danmarkar at tæna og síðani á Sorø Húsarhaldsskúla.

Tá prentsmiðjan Estra byrjaði sítt virkið í Syðrugøtu í 1966 í einum gomlum pakkhúsið úti á kajuni, vóru bert 2 starvsfólk - Elinborg og stjórin, Stig Rasmussen.

Hans í Bartalsstovu seldi olju og bensin í Syðrugøtu í nógv ár, seinnu árini tók Elinborg sær av hesum starvi burturav.

Elinborg hevur haft stóran áhuga í ættargransking, og mangar eru tær ættartalvur, sum hon hevur latið úr hondum.

Elinborg og Sólarn eiga 2 døtrar, Jórun og Maigun, og eiga tey 5 barnabørn og eitt langommu- og langabbabarn.

Heimið í Syðrugøtu hevur altíð verið eitt opið og lívligt heim, merkt av gestablídni, og hava nógv fólk haft sína dagligu gongd har.

Dagurin verður hátíðarhildin saman við familjuni.

## Eitt minni um foreldur míni



*Esmar Olsen*
** 6. august 1930 + 18. mai 2002*

*Ebba f. Joensen*
** 13. oktober 1929 + 3. januar 2004*

Pápi var føddur á Húsum, sonur Marius Olsen av Gørðum á Húsum og Elspu f. Mikkelsen úr Barbustovu í Syðrugøtu. Tey fluttu til Havnar tá hann var 10 ára gamal. Omman, mamma Marius, var úr Gong, so her vóru nógv skyldfólk.

Mamma var fødd í Vík, dóttur Hans Paula Joensen handilsmann á Bø í Vík og Astrid f. Joensen úr Pállsstovu á Eiði.

Pápi og mamma møttust í Havn í 1950. Hon arbeiddi í handli og hann var nýlærdur træskipasmiður og arbeiddi á skipasmiðjuni.

Tey fingu fimm synir. Kári 1951, Bjarni 1954, Torbjørn 1956, Hans Pauli 1957 og Marius 1963.

Tey fyrstu árini búðu tey í Vík, og flutti í 1954 í nýggj hús í Havn. Og hesi húsini vóru nakað serstakt. Ikki tí at tey vóru størri ella vakrari enn onnur hús, men tí, at tey vóru nýtt til fulnar.

Sum so nógva aðrastaðni svóvu synirnir í etasjuseingjum, kjallarin var verkstaður, sum teir kundu nýta sum teimum lysti, og stovan, hon var ikki bert eitt lesirúm at slappa av í, ella uppihaldsrúm til sunnudagsgestir. Nei, hon var eisini eitt stórt spælirúm, eitt arbeiðsrúm til børnini, eitt atelier til synirnar. Har varð skapað frá hond, hvønn einasta dag. Klipt, límað, teknað og málað. Bert halgidagar og føðingardagar varð stovan ruddað, og morgunin eftir var hon aftur ein verkstaður. Aftur at skapa. Aftur at læra lívið.

Pápi tú gav mær landið
Um ævirnar tú taldi
og bar meg í skaparaheim
at sálin liva skal

nú bíðað á fjærum sandi
um alla tíð eg haldi
til tín henni longdist heim
at hvílan verur sæl

Tú lærdi meg at ganga
Og sjálvt nú tú ert følnað
inn í huga heim
tú til ert fyri mær

í hendurnar at hanga
tí hjartað er ikki kølnað
og syftið meg í sveim
tað fyri mær enn slær

Mamma tú gav mær mjólk
Tá tokan aftur lættir
og spegladi eygu míni
og ljósið finnur veg

at hyggja út um hólk
tá síggjast vit so aftur
longur enn havsbrúgva sýnið
pápi, tú og eg

Hvílið í friði

**Bjarni**

## Martin E. Hansen 80 ár



Í dag 8. januar verður Martin E. Hansen í Fuglafirði 80 ár.

Sum 16 ára gamal fór Martin í læru sum timburmaður hjá Kristian hjá Benadikt í Fuglafirði. Hetta var undir krígnum, og lítið byggitilfar fekst til vega. Hetta gjørdi, at lítið varð av timburarbeiði og tí varð nógv málaraarbeiði gjørt tey fyrstu árini. Martin hevur dámað sera væl handverkið, og hevur alt sítt arbeiðslív verið innan hetta yrki.

Guds orð hevur ligið Martini tætt at hjarta. Tann strævni gerandisdagurin hevur ikki køvt áhugan fyri orði Guds og áhugan fyri at kunngera evangeliið. Serliga tey seinnu árini er nógv tíð farin til lesnað, og áhugavert er at samskifta við Martin um ymisk andalig viðurskifti, har hugsjónirnar ikki altíð verða tillagaðar rákinum, ið er frammi í dag. Hetta ger mangan, at ljósið verður varpað á avbjóðingar, ið nógv onnur ikki gáa um.

Hóast aldurin er vorðin høgur, so er áhugin fyri viðurskiftunum kring okkum framvegis stórur. Hetta er bæði galdandi fyri viðurskifti heima á klettunum og heilt til viðurskiftini í Miðeystri, ið mangan verða umtalað í ljósinum av tí profetiska Orðinum.

Martin hevur altíð havt stóran áhuga fyri kríatúrum og náttúruni, og nú, tá røktingararbeiðið ikki kann gerast longur, koma teir dagligu morguntúrarnir á asfaltinum væl við. Hæddarpunktið á túrinum er at sita undir opnum himli úti á Breiðá, lítandi út á Pollin og norð ígjøgnum Djúpini, við heimbygdini innari. Hetta stórbæra umhvørvi, ið er Martini so kent - sum røktingarmaður á Rustini, frá torvskurði í Góðadali og á floti í fjørðinum. Her, ið hann hevur búleikast øll síni ár, kann hann í dag sita og gleðast um eitt lív, sum bæði hevur havt viðgongd og mótgongd, men har hansara klettafasta trúgv, hevur roynst eins og fjøllini um bygdina, sum lívd og skjól, eins og hansara góði vinur, ið fyri nøkrum døgum síðani legði árarnar inn, yrkti :

Tey fjøll umkring mítt heimaból,
Tá ódn seg hevur hvest,
Øll hava roynst sum lívd og skjól
Og vart mítt heim sum best.

Sami yrkjarin sigur eisini, at sjálvt um lágur landnyrðingur kann leika hart á, so er hinvegin vakurt at skoða lágan landnyrðing tá »tó stormandi, mest eingin ætt, er har, sum fólk mítt býr.« At skoða norð ígjøgnum Djúpini á lágum landnyrðingi kann verða øgiligt, men inni í bygdini har »fólk mítt býr« er stilli. Í øllum gerandisligum baksi, hevur Martin, eins og flest onnur, upplivað bæði stormandi lágan landnyrðing og stilli, men gott er at vita á kvøldi lívsins, at vit brátt skulu verða heima har »fólk mítt býr«, hvar altíð er stilli.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Kartni Winther 90 ár:

# 90 ára føðingardagur í Hornahúsunum

**Fríggjadagin 2. januar var opið hús í Hornahúsunum í Havn í sambandi við at Kartni Winther, fyrrverandi heilsølumaður, fylti 90 ár. Hóast høga aldurin gongur Kartni hvønn dag úr miðbýnum og niðan á trøðna hjá sær uppi við Svartafoss**



*90 ára føðingardagurin hjá Kartni Winther í Hornahúsunum. Her eru Dagmar og Kartni millum synirnar, Árna og Mads Andrias*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Kartni er føddur í Havn 2. januar 1914, sonur Sigrid, f. Mohr, vanliga nevnd Gigga, úr Havn, og Mads Andreas Winther av Sandi.

Í 1916 flutti Kartni saman við foreldrunum til Sands, tá papin bleiv settur sum sýslumaður har.

Sum sjey ára gamal kom hann aftur til Havnar at ganga í skúla. Hann gekk í barnaskúla, millumskúla og realskúla. Síðan fór hann í skrivstovulæru hjá Balslev & Co.

Í 1935 fór hann til Keypmannahavnar at ganga á handilsháskúla. Tá hann varð liðugur við skúlagongdina, var seinni heimsbardagi byrjaður, og hann slapp tí ikki heim.

Hann arbeiddi sum skrivstovumaður og var sera virkin í Føroyingafelagnum í Keypmannahavn undir krígnum.

Hann giftist í Keypmannahavn við Dagmar, f. Johannesen, ættað úr Funningi, sama dag sum tey fóru til Føroya við fyrsta farti eftir kríggið í 1945.

Kartni fór aftur í starv sum skrivstovumaður hjá Balslev & Co og bleiv stjóri har í 1956. Hetta starv røkti hann, til hann í 1969 yvirtók heilsøludeildina hjá Balslev, sum seldi matvørur og skipsútgerð. Tá stovnaði hann sína egnu fyritøku, Kartni Winther & Co., sum helt til á Eystaru Bryggju. Seinni bleiv ein nýggjur heilsølubygningur bygdur við Staravegin.

Tá Kartni gavst, yvirtók Torbjørn Sørensen, sum arbeiddi hjá honum, fyritøkuna.

Kartni Winther var býráðslimur í Havn í 50-unum og hevur sitið í ymiskum nevndum, eitt nú líkningarnevndini og skúlanevndini.

Dagmar og Kartni eiga synirnar Mads Andrias og Árna. Tey eiga sjey ommu- og abbabørn og trý langommu- og langabbabørn

Hóast Kartni er 90 ára gamal, gongur hann hvønn dag úr miðbýnum og niðan á trøðna, sum hann eigur uppi við Svartafoss, har hevur hann seyð og gæs.



*Kartni við langabbasoninum Árna Winther Jákupsson*

*Mynd: Jens Kristian Vang*





*Jutta Mortensen og Martin Tórgarð heilsa føðingardagsbarninum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Dagurin

**8. januar. Erhardus** ella **Erhardt.** Írskur munkur, sum doyði um ár 700. Ella kanska er talan um ein týskan biskup, sum fyri undurgerðir sínar verður skírdur halgimenni.
Týskt navn, samansett av *æra* og *harður.*




MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin


## Tøkk

Tøkk fyri sýnda samkenslu tá ið okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

**Birgitte Margrethe Viderø**
vanliga nevnd Birta,
Tórshavn

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til Jens Vilhelm Danielsen og Poul Færø fyri góð og troystarrík orð.
Tøkk fyri blómur og kransar, tykkum sum hjálptu til við jarðarferðini og tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Ein serstøk tøkk til heimasjúkrasystrarnar, heimahjálpirnar og tey, ið trúliga vóru um mammu seinastu tíðina.

*Familjunnar vegna*
**Emma, Ásbjørn og Sverri**